## Grant fær fýra ár

Avraham Grant, sum tók við sum fyribils venjari hjá Chelsea, tá Jose Mourinho fekk sekkin í heyst, sleppur at verða verandi í sessinum. Chelsea og Grant skrivaðu í gjár undir fýra ára sáttmála. 52 ára gamli Grant, sum var landsliðsvenjari, tá Ísrael vitjaði í Føroyum fyri tveimum árum síðani, varð í vár settur sum ítróttarstjóri í felagnum, men nú verður tað so sum venjari, at hann skal nýta næstu fýra árini.

## Bjørgólfur skal stjórna West Ham

Fyrrverandi íslendski fótbóltsforsetin, Eggert Magnusson, sum í vár gjørdist nevndarformaður í West Ham, fer nú úr felagnum. Magnusson gjørdist nevndarformaður, eftir at eitt íslendskt konsortium við Bjørgólfi Guðmundsson á odda keypti meginpartin av partabrøvunum í felagnum. Nú hevur Bjørgólfur sjálvur keypt tey 5% av partabrøvunum, sum Eggert átti, og tað verður eisini Bjørgólfur, sum verður nýggjur nevndarformaður í felagnum.

### 67.000.000

Tað er tað, sum Fabio Capello fær í ársløn, nú hann verður enskur landsliðsvenjari. Sum væntað kunngjørdi enska fótbóltssambandið í gjárkvøldið, at tað verður Capello, sum verður nýggjur landsliðsvenjari. Endaligar sáttmálasamráðingar eru á skránni í dag, men enskir miðlar vita at siga, at árslønin hjá Capello verður £4 mió – eftir skatt. Tað vil við øðrum orðum siga, at bruttolønin hjá landsliðsvenjaranum verður £6,5 mió. ella 67 mió. krónur.

# Mikkjal skrivaði undir

Í blaðnum í gjár vistu vit at siga, at tað eftir øllum at døma bert vantaði sjálv undirskriftin fyri at Mikkjal Thomassen bleiv EB/Streymari.

Partarnir vildu tá ikki gera viðmerkingar hvørt Mikkjal Thomassen skuldi til EB/Streym, men í gjárkvøldi kundu teir tó vátta søguna, tá almenna heimasíðan hjá EB/Streymi boðaði frá, at felagsliðið hevur gjørt sáttmála við landsliðs- og nú fyrrverandi B36-leikaran. Mikkjal Thomassen er fjórði leikarin, sum er komin aftrat liðnum síðan landskappingin endaði. Hinir eru Fróði Clementsen úr AB, Levi Hanssen úr Skála og Høgni Zachariassen úr ÍF.




*Nýggjast leikarin í hópinum hjá EB/Streymi, Mikkjal Thomassen*

**Hondbóltur**

SUNSET KAPPINGIN
KVINNUR

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Stjørnan | 9 | 8 | - | 0 | - | 1 | 260 | 194 | 66 | 16 |
| 2 | Neistin | 8 | 6 | - | 0 | - | 2 | 208 | 173 | 35 | 12 |
| 3 | VB | 8 | 4 | - | 1 | - | 3 | 179 | 170 | 9 | 9 |
| 4 | Kyndil | 10 | 3 | - | 1 | - | 6 | 219 | 254 | -35 | 7 |
| 5 | StÍF | 9 | 2 | - | 1 | - | 6 | 197 | 228 | -31 | 5 |
| 6 | VÍF | 10 | 2 | - | 1 | - | 7 | 203 | 247 | -44 | 5 |

ATLANTIC AIRWAYS KAPPINGIN
MENN

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | StÍF | 10 | 7 | - | 1 | - | 2 | 283 | 240 | 43 | 15 |
| 2 | Neistin | 10 | 7 | - | 1 | - | 2 | 282 | 260 | 22 | 15 |
| 3 | H71 | 10 | 5 | - | 0 | - | 5 | 253 | 252 | 1 | 10 |
| 4 | VÍF | 10 | 4 | - | 1 | - | 5 | 275 | 284 | -9 | 9 |
| 5 | Kyndil | 10 | 4 | - | 0 | - | 6 | 245 | 272 | -27 | 8 |
| 6 | KÍF | 10 | 1 | - | 1 | - | 8 | 247 | 277 | -30 | 3 |

**Flogbóltur**

**Meistaradeild kvinnur**

| | | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | sett munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | SÍ | 9 | 8 | - | 1 | 26 | 7 | 19 | 16 |
| 2 | ÍF | 8 | 7 | - | 1 | 21 | 8 | 13 | 14 |
| 3 | Dráttur | 9 | 6 | - | 3 | 20 | 14 | 6 | 12 |
| 4 | KÍF | 8 | 4 | - | 4 | 17 | 14 | 3 | 8 |
| 5 | TB | 9 | 3 | - | 6 | 11 | 20 | -9 | 6 |
| 6 | Mjølnir | 9 | 2 | - | 7 | 11 | 22 | -11 | 4 |
| 7 | Fleyr | 8 | 0 | - | 8 | 3 | 24 | -21 | 0 |

**Meistaradeild menn**

| | | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | settmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | SÍ | 8 | 7 | - | 1 | 20 | 8 | 12 | 14 |
| 2 | Mjølnir | 7 | 5 | - | 2 | 16 | 4 | 12 | 10 |
| 3 | ÍF | 6 | 4 | - | 2 | 11 | 10 | 1 | 8 |
| 4 | Fram | 6 | 1 | - | 5 | 6 | 15 | -9 | 2 |
| 5 | Fleyr | 7 | 0 | - | 7 | 2 | 18 | -16 | 0 |

Visti tú ikki tað? Sosialurin